# Havið svart av lomviga

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Fleyr til gul av vestri ella av ymsum ættum, turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 13 og 16 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum, seinnapartin upp í stívt andøvsgul av landnyrðingi. Turt og sólglottar og hitin millum 13 og 16 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum, turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 12 og 15 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin upp í gul av ymsum ættum, turt og sólglottar. Týsdagin veksur hann vindin upp í hvassan vind av landsynningi og regn. Hitin millum 10 og 14 stig.

**Eg havi ikki sæð so nógvan lomviga fyrr. Einar tveir fjórðingar norður úr Kallinum og allan vegin inn í Djúpini var havið svart av lomviga og lunda, sigur skiparin á Jupiter, Martin Petersen**

**SVARTFUGLUR**
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Samstundis sum tað hoyrist frá fleygaplássunum um óvanliga vánaligt fleygaár, sær kortini út til, at fuglur er undir landinum.

Tá vit tosaðu við Martin Petersen, skipara á Jupiter, í morgun, kundi hann greiða frá einari slíkari rúgvu av svartfugli, sum hann ikki hevði sæð áður.

- Havið var svart av fugli. Har var bæði lomvigi, álka og lundi, sigur Martin Petersen.

Hann heldur, at tað man vera nebbasildin, sum dregur fuglin á ta leiðina.

- Hetta er góð sildafiskaleið, og tað rekur norður í løtuni, so tað passar væl, segði Martin Petersen, tá vit tosaðu við hann.

Tá vóru teir komnir inn í Djúpini, og teir sóu framvegis stórar lomvigaflokkar, tó at fuglurin fækkaðist longur inn í Djúpini teir komu.

Jupiter hevur annars verið norðanfyri og leitað. Tað var sera nógvur makrelur at sígg-ja, men minni av sild. Sildin er annars so feit í løtuni, og tí leys í tí og illa nýtandi til matna.

- Vit fara inn nú at bíða. Tað gamla var at fara avstað eftir Ólavsøku, men eg vænti ikki vit bíða so leingi. Vit eru í hvussu er klárir, um sildin skuldi stungið seg upp á Sandoyarbankanum. Tað er heystgýtandi sildin, vit kalla. Makrelin plaga vit at fara á í oktober, sigur Martin Petersen.

Finnur Fríði og Tróndur í Gøtu eru eisini á veg inn. Teir hava somuleiðis verið norðanfyri og leitað, onkur heilt norðuri móti grønlendska markinum.

Tað passar samstundis sera væl hjá skipunum at koma inn júst nú, tá ið G! festivalurin fer í gongd.



*Tað var so nógvur svartfuglur at síggja norður úr Kallinum, sum menn ikki vita um*

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 7 |
| Nuuk | 8 |
| Qaqortoq | 12 |
| Ammassalik | 4 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 17 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 12 |
| London | 21 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 15 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 23 |
| Keypmannah. | 25 |
| Helsinki | 22 |
| Moskva | 21 |
| Berlin | 34 |
| Warzawa | 34 |
| Kiev | 31 |
| Bukarest | 33 |
| Paris | 24 |
| Madrid | 26 |
| Róm | 31 |
| Malorca | 27 |
| Athen | 34 |
| Malta | 30 |
| Tunis | 32 |
| Beijing | 32 |
| New Dehli | 35 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | -- |
| Sydney | 11 |
| New York | 27 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | -- |
| La Paz | 10 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 16 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt hátrýst, 1025 hPa. sunnan fyri Ísland kemur spakuliga móti Føroyum.




**Í dag:**
Hátrýstið við Føroyar stendur í stað umleið vikuna út.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 16/7 kl. $06^{00}$ – 17/7. $06^{00}$. Hitin í gjár: 10,2°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 1/7 kl. $06^{00}$– 2/7 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í juli: 28,0 mm




Mikukvøld 18. Juli
kl. 19.30
*MFS skipar fyri kjakkvøld um umstøður teirra lesandi í Føroyum*

## VESTFALLSKYRRINDI

9. juli Mánin næstur jørðini
14. juli Tendring
22. juli Fyrra kvarter
Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2007

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 19. Juli | 11.12 | 23.32 | 10.12 | 22.32 | 10.27 | 22.47 | 00.53 | 13.12 | 01.53 | 14.12 | 09.27 | 21.47 | 08.27 | 20.47 | 11.27 | 23.47 | 00.08 | 12.27 | 10.57 | 23.17 | - | 12.12 |
| 20. Juli | 11.51 | - | 10.51 | 23.09 | 11.06 | 23.24 | 01.32 | 13.51 | 02.32 | 14.51 | 10.06 | 22.24 | 09.06 | 21.24 | - | 12.06 | 00.47 | 13.06 | 11.36 | 23.54 | 00.32 | 12.51 |
| 21. Juli | 00.09 | 12.28 | 11.28 | 23.48 | 11.43 | - | 02.09 | 14.28 | 03.09 | 15.28 | 10.43 | 23.03 | 09.43 | 22.03 | 00.24 | 12.43 | 01.24 | 13.43 | - | 12.13 | 01.09 | 13.28 |
| 22. Juli | 00.48 | 13.22 | - | 12.22 | 00.03 | 12.37 | 02.48 | 15.22 | 03.48 | 16.22 | 11.37 | - | 10.37 | 23.11 | 01.03 | 13.37 | 02.03 | 14.37 | 00.33 | 13.07 | 01.48 | 14.22 |
| 23. Juli | 01.56 | 14.29 | 00.56 | 13.29 | 01.11 | 13.44 | 03.56 | 16.29 | 04.56 | 17.29 | 00.11 | 12.44 | 11.44 | - | 02.11 | 14.44 | 03.11 | 15.44 | 01.41 | 14.14 | 02.56 | 15.29 |